tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 37 mikudagur 22. februar 1995 69. árgangur Krónur 7,00

# Fartelefonin hoyrist í útvarpinum



*– Tú kanst ongantíð tryggjað teg til fulnar. Sjálvt eina vanliga telefon ber til hjá honum at lurta av, ið leggur seg eftir tí, sigur Jens Julian Reinert á Telefonverkinum*

**Lesið á baksíðuni**

# Heri skal kanna føroyska seismikkin

**Lesið á síðu 11**



# Tað seinasta Nyrup-brævið broytir einki

*– Vit tosa ikki um annað enn tað, løgtingið og landsstýrið eru samd um, er niðurstøða landsstýrisins*

Um danski forsætisráðharrin Poul Nyrup Rasmussen er tornæmur, ella talan er um, at boðskapurin hjá løgtingi og landsstýri ikki er nóg greiður, so hevur Nyrup sent enn eitt bræv til Føroya. Hann slær fast, at talan verður ikki um dómarakanning, men hann er sinnaður til at tosa um aðra kanning av føroyska bankamálinum.

Men landsstýrið er ikki at vika. Bæði løgmaður Edmund Joensen og Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri gera greitt, at landsstýrið broytir ikki støðu, og fer ikki at fund við danska forsætisráðharran at tosa um aðra kanning enn dómarakanning.

Jóannes Eidesgaard leggur afturat, at føroyska heimastýrið kann bert siga hvat tað ynskir. Og tað hava vit gjørt. Hinvegin hevur danska stjórnin loyvi til at fremja ta kanning hon ynskir, uttan at spyrja okkum eftir. Jóannes Eidesgaard sigur seg ikki skilja, hví Nyrup ikki fer undir ta kanning, sum hann hevur sett sær fyri.

tór.-

*VILHELM JOHANNESEN, javnaðartingmaður:*

# Bjørn á Heygum skal ikki úttala seg vegna løgtingið

*– Formaðurin í rættarnevndini skal leggja løgfrøðiliga hamin frá sær, tá hann er tingmaður, sigur Vilhelm Johannesen, ið heldur hetta vera eindømi, at ein tingmaður kann úttala seg vegna løgtingið*

*síða 6*

*Sera framkomin telduútgerð til Føroya úr Bretlandi:*

# Nú byrjar tulking av seismikkinum

*Nú byrjar hon - tulkingin av tí fyrsta lidna seismiska tilfarinum, sum amerikanska felagið Western skjeyt við Føroyar í fjør. Sunnudagin koma teir fyrstu 1000 kilometrarnir av processeraðum seismikki og ein sera framkomin arbeiðsstøð til Føroya við farmaskipi úr Bretlandi. Ikki bara í Føroyum verður farið undir at tulka tilfarið. Eisini fleiri oljufeløg fáa tilfarið at viðgera víðari. Hol verður sett á eitt nýtt og spennandi kapitull í leitingini eftir olju í føroysku undirgrundini. Hetta hendir um nøkunlunda somu tíð, sum bretar og føroyingar fara inn í eitt nýtt og kanska avgerandi umfar í samráðingunum um markið.*



*Westerndiskar við seismiskum upptøkum. Slíkir eru nú á veg til Føroya við upplýsingum um føroysku undirgrundina.*



*Heri Ziska jarðfrøðingur her við nakað av tí gamla og endurviðgjørda seismiska tilfarinum, sum varð skotið við Føroyar í 1978 og fyrst í 80-unum. Tað er í hesum hølunum á lofthæddini í bygninginum hjá Demic við Velbastaðvegin, at nýggja arbeiðsstøðin verður uppsett í næstu viku. Mynd kalmar*

Hóast tað hevur tikið nakað longri tíð enn roknað varð við, so eru teir umleið 1000 kilometrarnir av seismiskum tilfari undan Føroyum nú klárir til at verða tulkaðir av serfrøðingum.

Á høvuðsstøðini hjá amerikanska seismikkfelagnum Western í London eru teir nú í ferð við at pakka tað proceseraða tilfarið til oljufeløg og onnur áhugað umframt til Føroya.

Sambært avtaluni millum Føroyar og Western skulu føroyingar hava avrit av øllum tilfarinum, soleiðis at okkara egnu serfrøðingar eisini sleppa at tulka hetta tilfarið.

Nú sunnudagin kemur so farmaskipið Halgafelli til Føroya úr Bretlandi. Umframt tað virðismikla seismiska tilfarið er eisini ein arbeiðsstøð til Oljufyrisitingina. Henda arbeiðsstøðin fevnir um tvær stórar og sera framkomnar teldur, ið eru serútgjørdar til at tulka seismiskt tilfar.

**Strandingur**

Tað verður strandingurin Heri Ziska, sum kemur at standa fyri tulkingarbeiðinum í Føroyum. Hann er 27 ára gamal og tók prógv sum jarðfrøðingur í Århus í fjør. Heri hevur specialiserað seg innan seismiska tulking.

Í hesum sambandi hevur hann arbeitt á høvuðsstøðini hjá Western í nakrar mánaðir, og har fingið innlit í, hvussu vinnulivið arbeiðir.

Heri Ziska, sum varð settur í arbeiði á Oljufyrisitingini í september í fjør sigur, at hann longu tíðliga í sínum lesnaði bleiv bitin av júst hesi sergreinini. At fara til arbeiðis hjá einum seismikkfelag so stutt eftir lokna útbúving tekur Heri sum eina stóra og sera positiva avbjóðing.

**Tulka eldri tilfar**

Síðani Heri fór til arbeiðis á oljufyrisitingini hevur hann tikist við at tulka eldri seismiskt tilfar frá Western. Her er talan um seismikk, ið varð skotin við Føroyar í 1978 og fyrst í 80-unum.

Hetta tilfarið hava serfrøðingar hjá Western við gjørt heilt av nýggjum við tí nýggjastu tøknifrøðini - tað teir á fakmáli kalla, reprocesserað.

Heri Ziska sigur, at tað hevur verið áhugavert at arbeiða við hesum tilfarinum. Hóast tað uppruna-liga er gjørt við minni framkomnari útgerð enn henni vit hava í dag, so er okkurt av tilfarinum tó so mikið gott, at tað ber til at síggja niður gjøgnum basaltið í støðum. Men tað er sjálvandi stórur munur á linjunum, sum eru skotnar. Hetta tilfarið er partur av trimum ymiskum kanningum.

**Spenndi uppgáva**

Nú kemur so tað nýggja tilfarið frá Western, sum varð skotið í fjør. Ætlanin var, tað skuldi vera klárt nakað fyrr, men tað hevur so tikið drúvari tíð at viðgera hetta tilfarið enn mett.

Heri Ziska, sum í næstu viku fer undir at seta arbeiðstøðina upp og síðani byrjar at tulka tilfarið, er sjálvandi sera spentur, um tað finst olja í føroysku undirgrundini. Sjálvur er hann optimistur, men nú fáa vit so at síggja, hvat tulkingin av tí seismiska tilfarinum vísir og so sjálvandi møguligar víðari kanningar.

Heri fer at hava tætt samarbeiði við serfrøðingarnar á Danmarks Geologiske Undersøgelse og við Judith Neish, sum landsstýrið hevur sett at ráðgeva føroyingum.

**Lorvíkur hjá Statoil**

Tað er so ikki bert hesin eini eysturoyingurin, sum fer at tulka seismiskt tilfar frá Western. Niðri í Keypmannahavn á støðini hjá Statoil situr ein lorvíkingur og bíðar eftir sama tilfarinum. Tað er Petur André Norðgerð, sum hevur fingið starv hjá Statoil við tí fyri eygað at vera við til at tulka fyrsta tilfarið frá Western.

jan



*Heri vísir okkum nakrar av diskettunum við eldri seismiskum kanningartilfar undan Føroyum. Nú kemur so nýggjasta tilfarið klárt til at tulka. Mynd Kalmar*